## Hækkar vinnuskattin

Í USA hevur Barrack Obama, forseti, sett sær fyri at tetta nøkur hol í skattalógini, sum vinufyritøkur hava verið dugnaligar at gjørt sær dælt av. Samstundis ætlar hann at styrkja skattaeftirlitið vog at leggja størri dent á at kanna skattaviðurskifti. Útrokningar hjá umsitingini vísa sambært AP, at hesi tiltøk fara at geva ríkiskassanum 210 milliardir dollarar afturat í skattainntøku tey næstu tíggju árini. Eitt av tiltøkunum hjá stjórnini er at forða fyri, at amerikonsk vinnu- og handilsvirkir flyta pening til onnur lond, har skatturin er minni enn í USA.



## Kann elva til sosiala kreppu

Fíggjarmálaráðharrar í evrulondunum ávara nú um, at búskaparkreppan og kreppan á fíggjarmarknaðinum kunnu elva til eina sosiala kreppu í Evropa. Ráðharrarnir hildu fund í Bruxelles í gjár, og aftan á fundin segði fíggjarmálaráðharrin í Luksenburg, Jean-Claude Juncker, at vit eru mitt í einari búskaparligari og fíggjarligari kreppu og á veg ímóti einari sosialari kreppu. Juncker, sum er formaður hjá fíggjarmálaráðharrunum í evrulondunum, bað arbeiðsgevarar drála sum longst við at koyra fólk úr arbeiði. ES-nevndin hevur mett, at 8,5 milliónir evropear fara at missa arbeiði í 2009 og 2010, og at arbeiðsloysið í evrulondunum kjemur upp í 11,5 prosent.

# idagar færri í ár

**Samanbera vit tíðarskeiðið frá byrjanini av verandi fiskiárið til í dag við sama tíðarskeið seinasta fiskiár, so eru tilsamans 1.488 dagar færri nýttir. Hetta tal nærkast mongdini av døgum, ið eru færri í verandi fiskiárið. Tað talið er 2.125 dagar tilsamans**

## Munandi færri dagar nýttir

| | Nýtir dagar í ár | Nýttir dagar í fjør | Munur | Dagar tilsamans í ár |
|---|---|---|---|---|
| Bólkur 2 | 2.600 | 3.309 | 709 | 4.639 |
| Bólkur 3 | 1.756 | 2.039 | 283 | 3.057 |
| Bólkur 4A | 317 | 419 | 102 | 1.033 |
| Bólkur 4B | 865 | 872 | 7 | 1.579 |
| Bólkur 4T | 596 | 983 | 387 | 1.362 |

Tølini eru nýttir fiskidagar í tíðarskeiðinum 1. septembur 2007 til 4. mai 2008 og í tíðarskeiðinum 1. septembur 2008 til 4. mai 2009

*Kelda til tøl: Fiskiveiðieftirlitið*

FISKIDAGAR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hyggja vit at, hvussu nógvir vanligir fiskidagar eru nýttir av skipabólkunum undir fiskidagaskipanini. Bólkunum: 2, partrolarar, 3, línuskip, 4A, før millum 15 og 40 bruttotons, 4B, før millum 40 og 110 bruttotons og 4T, trolarar. So kunnu vit út frá tølum hjá Fiskiveiðieftirlitinum finna fram til, at til samans 1.488 dagar færri eru nýttir frá 1. septembur 2008 til í dag, í mun til sama tíðarskeið seinasta fiskiár.

Útfrá hesum tølum, kann eisini staðfestast, at tað er sera lítil møguleiki fyri, at allir fiskidagarnir í ár verða nýttir, hóast tað til samans eru 2.125 dagar færri.

Hetta samlaða tal varð skert frá 13.795 dagar til 11.670 dagar.

### Partrolarar

Hyggja vit at partrolarunum. Bólki 2, so er greitt, at hesin bólkur hevur nýtt 709 dagar færri í tíðarskeiðinum í ár í mun til í fjør.

Dagarnir eru í hesum bólki skerdir við 515 døgum, og Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, er sannførdur um, at henda skerjing av døgum ikki fer at hava nakra ávirkan á fiskiskapin í verandi fiskiárið.

– Tað er ikki meira enn tað loysir seg at loysa, og tí hava nøkur av skipunum ligið heilt nógv. Somuleiðis hevur oljuprísurin fram til fyri kortum havt eina stóra ávirkan, so tað sigur seg sjálvt, at skipini ikki hava fingið so nógv burturúr, sigur Viberg Sørensen.

Somuleiðis tekur hann partrolararnar í Klaksvík, sum eru farnir undir hamaran, og partrolarar í Suðuroy fram sum dømir um skip, ið hava ligið leingi.

### Línuskip

Taka vit allan bólk 3, so hava línuskipini nýtt 283 dagar færri í verandi fiskiárið samanborið við sama tíðarskeið í seinasta fiskiárið.

Dagarnir eru skerdir við 382 døgum, og stóri trupulleikin hjá línuskipunum hevur verið, at tað hevur verið sera torført at manna línuskipini, tí fólkið umborð hevur bert fingið minstuløn.

– Vit hava veitt nógv meira á djúpum vatni, har dagarnir telja minni, samstundis, sum vit hava verið meira undir Íslandi. Tað er ein orsøk til færri dagar, sigur Jóhannes M. Olsen, formaður í felagnum línuskip.

Hann staðfestir tó, at aðrir faktorar eisini hava gjørt seg galdandi.

– Til tíðir hava vit havt trupult við at manna skipini. Oktoburmánaður var eitt langt ódnarveður, skipini vórðu løgd fyrr í desembur og fóru seinni avstað í januar, tí prísurin var so ringur, staðfestir formaðurin í felagnum línuskip.

Samstundis greiðir hann frá, at manningin í stóran mun hevur fingið minstuløn, og tí hevur verið torført at manna skipini, so tað hevur verið torført við línuskipum í ár.

Eisini er greitt, at felagið línuskip í fer við eina ætlan, sum tað fer at leggja fyri landsstýrið.

Tó er Jóhannes M. Olsen sannførdur um, at tað ikki ber til at skerja dagarnar meira, tí tað eru nógv skip, ið fara at mangla dagar, hóast tað er vist, at ikki øll skipini nýta sínar dagar.

– Men tað týdningarmesta av øllum er at vit ikki missa mótið í flotanum, tí skulu vit hava ein møguleika, so mugu vit bara díkja á, sigur formaðurin í felagnum línuskip.

### Útróðarbátar

Í bólkunum 4A og 4B, sum eru størru útróðrarbátarnir, eru nýttu dagarnir 102 og 7 dagar færri enn sama tíðarskeið í fjør. Bólkur 4B, hevur sostatt nýtt umleið sama tal av døgum sum í fjør.

Líka sum við øllum hinum bólkunum eru dagarnir skornir niður, tað eru 420 og 372 dagar.

Auðunn Konráðsson, formaður í meginfelag útróðrarmanna, metir, at tað er torført at greiða frá, hví teir hava nýtt færri dagar, men hann staðfestir, at tað ikki skal so nógv til, áðrenn 100 dagar, ikki verða nýttir.

– Tað skal ikki nógv til at broyta talið. Bara ein bátur er, sum ikki er í drift, so eru 70 dagar, ið ikki verða nýttir, greiðir hann frá.

Hann greiðir tó frá, at tað ikki stendur nakað serligt til hjá útróðrarbátunum.

– Prísurin er so øgiliga ringur, so tað sigur seg sjálvt, at tað er torført. Tó metir hann, at mann til heystar finnur útav, hvønn veg tað ber við prísinum.

### Trolbátar

Í bólkinum har nýttu dagarnir eru minkaðir mest er hjá trolbátunum, sum hava nýtt 387 dagar færri í verandi tíðarskeiðið í mun til tíðarskeiðið í fjør.

Teir eru farnir frá 983 brúktum døgum frá 1. septembur 2007 til 4. mai í fjør til 596 dagar í sama tíðarskeið í 2008 og í ár.

Theodor Poulsen, formaður í felagnum trolbátar, greiðir frá, at tríggir bátar hava ligið øgiliga nógv, og ein teirra er longu seldur til Ný Sælands. Somuleiðis hevur fiskiskapurin verið øgiliga smáligur, samstundis, sum hann harmast veðrið í januarmánaði.

Hann staðfestir saman við hinum, at prísirnir hava verið sera lágir, og saman við oljuprísunum, sum teir vóru, hevði tað við sær, at tað ofta ikki loysti seg at loysa.

– Mann kann illa siga annað, enn at vit eru góðir við stovnarnar, staðfestir Theodor Poulsen.

Hinvegin skal vitað heilt illa við, áðrenn manningin við trolbátum fær minstuløn, tí teir eru so fáir. Men onkuntíð hevur lønin ligið um minstuløn.

Men um eitt ár, roknar Theodor Poulsen við at streymurin vendur.

– Seinast tað vildi heilt illa við, vendi tað nógv skjótari enn fiskifrøðingarnir søgdu, og tað vóna vit verður aftur hesaferð, staðfestir formaðurin í felagnum trolbátar.

